# Tepur meiriluti fyri at avtaka døgurðatíman

**Birgir Nónsgjógv, virkisleiðari, sigur, at tilsamans 60 fólk atkvøddu; 32 vóru fyri at broyta døgurðatíman til matarsteðg, meðan 27 vóru ímóti. Ein atkvøða var blonk**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Mánadagin atkvøddi arbeiðsfólkið á saltfiskavirkinum hjá Fiskavirking á Toftum um at broyta døgurðatíman til matarsteðg. Atkvøtt varð um eitt ítøkiligt uppskot, sum leiðslan á virkinum saman við álitisfólkunum hevur gjørt. Skotið er upp at hava ein matarsteðg í 20 minuttir millum kl. 12 og 13 og síðan ein kaffisteðg fyrrapart og ein seinnapart uppá 15 minuttir hvør. Við hesi skipan hevði vanligi arbeiðsdagurin verið liðugur kl. 16.10. Um arbeitt verður longri, verður yvirtíð goldin eftir kl. 16.10.

## Tepur meiriluti

Birgir Nónsgjógv, virkisleiðari, sigur, at tilsamans 60 fólk atkvøddu um uppskotið; 32 vóru fyri at broyta døgurðatíman til matarsteðg, meðan 27 vóru ímóti. Ein atkvøða var blonk.

Spurdur, hvat leiðslan fer at gera, nú meirilutin er so tepur, sigur virkisleiðarin, at leiðslan fer at skriva Arbeiðsmannafelagnum á Toftum eitt bræv, har greitt verður frá úrslitinum. Spurt fer eisini at verða, um felagið góðtekur uppskotið, sum meirilutin hevur samtykt.

Birgir er ikki so sannførdur um, at arbeiðsmannafelagið fer at taka undir við hesum, men hetta fæst ikki at vita, fyrr enn felagið hevur sagt sína hugsan um málið.

- Eg stúri fyri, at tað verða hasir seinastu 10 minuttirnir, sum togast verður um, hóast teir eru fyri at "kompensera" lønina hjá arbeiðsfólkinum, tí kaffisteðgirnir í uppskotinum eru 15 minuttir í staðin fyri 10 minuttir hvør.

Virkisleiðarin heldur tað vera órealistiskt, um kaffisteðgirnir fyrrapart og seinnapart bert verða 10 minuttir, tí tá fáa fólk ikki stundir at koma úr og í klæðini aftur.

- Tí halda leiðsla og álitisfólk tað vera skilabetri at hava kaffisteðgir, sum kunnu haldast, sigur hann.

## Eina roynd vert

Birgir sigur, at fer arbeiðsmannafelagið at geva uppskotinum sítt viðmæli, verður skipanin sett í verk í einar 2-3 tríggjar mánaðir sum eina roynd.

- So, kann málið við matarsteðgi ella døgurðatíma takastuppaftur. Halda fólk tá, at gamla skipanin var betri, er einki til hindurs fyri at venda aftur til vanligan døgurðatíma.

Birgir er ikki í iva um, at tað, sum arbeiðsfólkið hevur tikið støðu til, er, um tey vilja hava døgurðatíma, soleiðis sum hann er í dag ella ein matarsteðg og harvið sleppa fyrri til hús.

- Eg trúgvi ikki, at hasir 10 minuttirnir, sum arbeitt verður eftir kl. 16, hava vigað tungt í avgerðini. Hetta snýr seg um døgurðatíma ella matarsteðg, sigur hann.

Onkur av pakkarunum, sum vanliga arbeiða eitt sindur longri enn hini fólkini, halda, at dagurin gerst og strævin, um døgurðatímin verður tikin av, men her vísir Birgir á, at eisini hesi fólkini sleppa ein tíma fyrr til hús, enn tey annars høvdu gjørt.

- Vit umhugsa eisini at gera eina skipan, har pakkararnir fáa "styrk", tá ið tað er neyðugt, so øll verða fyrri liðug, sigur Birgir Nónsgjógv, virkisleiðari.




Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Turt gólv í Saltangará

**Tað er lítil fiskur á marknaðinum í løtuni, og mánadagin og týsdagin vórðu bert smávegis nøgdir seldar um uppboðssøluna**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

**Saltangará:** Sjálvt um veðurlagið er heldur frægari aftur, er lítið fiskaarbeiði á fleiri virkjum kring landið.

Eitt av virkjunum, sum oftast plagar at hava nóg mikið av fiski, er Fiskavirking í Saltangará. Men har var turt gólv í gjár, og væntandi verður eisini turt gólv í dag.

Eingin landing var mánadagin og týsdagin, og á virkinum vistu tey ikki, nær tey fyrstu skipini koma innaftur at landa.

- Tað er lítil fiskur á marknaðinum í løtuni, og mánadagin og týsdagin vórðu bert smávegis nøgdir seldar um uppboðssøluna, sigur Jason Johannesen, virkisleiðari.

Á Fiskavirking í Saltangará arbeiddu tey tó alla síðstu viku, og tey arbeiddu eisini mánadagin, tí nakað av fiski lá niðurfyri frá undanfarnu viku.

## Smávegis ábøtur

- Í løtuni vita vit einki, men tað kann altíð okkurt stinga seg upp, og tað vóna vit, so steðgurin ikki verður ov langur, sigur virkisleiðarin.

Á fiskavirking í Saltangará verða smávegis ábøtur gjørdar, nú gólvini eru turr, og maskinurnar standa stillar.

Bilar
Nr. 26 • hósdagur • 7. februar 2002 • 76. árg.

Bilatorgið
s.16 & 17

# Renault Trafic – ársins vørubilur í Danmark og í Evropa

**Sum úrslit av Opel/Renault samstarvinum eru tveir samlíkir vørubilar komnir á marknaðin. Talan er um Renault Trafic og Opel Vivaro, ið eru næstan heilt eins. Teir verða gjørdir á eini GM verksmiðju í Onglandi. Bilarnir eru kosnir ársins vørubilar í Danmark og í Evropa. Vit hava her hugt nærri at einum Renault Trafic frá VR Bilu**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*



*Flutningsfyritøkan Safari Transport í Havn keypti fyrsta Renault Trafic av nýggja modellinum. Bilurin er av styttru útgávuni við 1.9 dCi commonrail dieselmotorinum við 100 hk og 6 gir. Knút Lützen frá Safari Transport, fær her bilin handaðan av Sverra Steintún frá VR Bilum*

Nýggi Renault Trafic er eyðkendur av markantum linjum og smartum designi, samstundis sum bilurin hevur sera rúmligan kassa. Trafic hevur notið gott av teimum royndum, ið Renault hava fingið í sambandi við menningina av øðrum Renault bilum, sum til dømis Kangoo og Master. Hetta hevur givið góð úrslit, og bilarnir hava fingið fleiri heiðurslønir í Evropa.

## Bilurin innan

Innan er Trafic sum ein persónbilur. Góður at sita í, útsýnið frá førarasetrinum er gott, og bilurin er lættur at koyra. Eins og á øðrum Renault MPV modellum er ein kappi omaná instrumentborðinum, so instrumentini ikki speglast í forrútinum. Nógv pláss eru til at leggja lutir frá sær á. Girstongin er í niðara parti av instrumentborðinum. Av standardútgerð kunnu vit nevna tónaðar rútar, fjarstýrt sentrallás, rættið og førarasetrið kunnu stillast í hædd.

## Skivubremsur aftan og framman

Tríggir motorar eru at velja ímillum, tveir 1.9 dCi commonrail dieselmotorar við ávikavist 82 og 100 hk. Eisini er ein bensinmotorur við 120 hk á skránni. Seinni kemur ein 2.5 dCi við 133 hk. Stórur dentur er lagdur á at halda rakstrarkostnaðinum niðri, við t.d. at hava langt millum eftirlitini. Allar útgávurnar hava skivubremsur framman og aftan. Saman við ABS bremsum og elektroniskum bremsukraftdeilara, eru bremsurnar á Trafic millum tær bestu í sínum klassa.

## Lastar 1200 kg

Trafic fæst í tveimum longdum við tveimum aksulfrástøðum og lastar upp til 1200 kg. Í stuttu útgávuni er rúmið í kassanum 5 rúmmetrar og í longru útgávuni, ið er 40 cm longri, er rúmið 5.9 rúmmetrar. Lessihæddin er lág, so lætt ar at handfara vøru í og úr bilinum, og hjólkassarnir taka lítið pláss úti í síðunum á kassanum. Seinni í ár kemur ein minibussur á skránna og ein kassavognur við høgum taki.

## Renault Trafic 1.9 dCi

| | |
|---|---|
| Motorurin | 4 syl. 1.9 dCi turbodiesel og 100 hk v. commonrail innspræning |
| Oljunýtsla | 13.5 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd | 205/65-16 |
| Stødd og vekt (styttra modellið) | |
| Longd | 478,2 cm |
| Breidd | 190,4 cm |
| Hædd | 195,9 cm |
| Eginvekt | 1900 kg |
| Lastar | 1200 kg |
| Kassin | 5.3 rúmmetrar |
| Søluumboð | VR Bilar<br>Hoyvíksvegur 61<br>FO-100 Tórshavn |


*Lessihæddin er lág, so lætt er at handfara vøru í og úr bilinum, eins og hjólkassarnir taka lítið pláss í kassanum.*


*Innan er Trafic sum ein persónbilur. Eins og á øðrum Renault MPV modellum er ein kappi á instrumentborðinum, so instrumentini ikki speglast í forrútinum*